# HEILSANIR



**Góði Martin**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum í morgin
**Ynskja omma, abbi, mammubeiggi og Annamostur**



**Góði fitti Búi**
Hjartaliga tillukku á tínum fyrsta føðingardegi 18. jan.
**Ynskja Adrian, Ari og Fía**



**Góði Jóan Petur**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum 18. jan.
Jesus fylgi tær á lívsleið tíni. Vit elska teg.
**Bestu ynskir omma, abbi og Jógvan gubbi**



**Góði elskaði Jóan Petur**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum. Jesus pápi signi teg. Vit elska teg.
**Mamma og babba**



**Góðu omma og abbi í Gøtu**
Hjartaliga tillukku við gullbrúðleypsdegnum Blikk Café í Saltangará

Kafé


Sosialurin *Heilsanir* kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur:

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur: Tlf.:

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<




# Høgni hitar upp í Vega

**Høgni Lisberg hitar í kvøld upp fyri skotska sangaran og sangsskrivaran Paolo Nutini, á útseldari konsert í Lítla Vega í Keypmannahavn**

KONSERT
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Høgni Lisberg hitaði herfyri upp fyri Badly Drawn Boy í Lítla Vega í Enghave í Keypmannahavn, í kvøld fer hann á pall í sama høli, sum upphiting fyri Paolo Nutini.

19 ára gamli Paolo Nutini hevur hóast italskt ljóðandi navnið ikki nakað serligt tilknýti til Italia, familjan hevur í 4 ættarlið búð í Skotlandi. Hann er uppvaksin við nógvum ymiskum tónleiki; m.a. skotskum fólkatónleiki og 50´ára rokk'n'roll, ið ávikavist abbin og pápin spældu fyri honum. Ein gumma vísti honum á soul tónleikin og presturin í býnum plagdi at spæla boogie woogie á klaverið hjá familjuni..

er navnet på en kun 19-årig singer/songwriter-debutant, som på trods af det italiensk-klingende navn faktisk er fra Skotland - endda fire generationer tilbage.

Í fjør kom fyrsta fløgan These Streets, og ummælarar vóru um at detta um beinini á hvør øðrum fyri at rósa honum. Fløgan seldi somikið væl, at hon kom beint inn á eitt triðja pláss á bretska hittlistanum.

Eisini danir hava tikið hann til sín, og tí er konsertin í kvøld útseld. Hetta er ein stórur møguleiki hjá Høgna Lisberg, ið sleppir at spæla fyri eini áskoðarafjøld, ið er komin fyri at lurta eftir tí slagnum av tónleiki, ið Høgni spælir.

Fløgan Morning Dew hjá Høgna Lisberg er fyri stuttum givin út í Danmark, og hetta er eitt høvi at marknaðarføra hana. Høgni er í uppskoti til planetina til besta tónleikanavn á Planet Awards 27. januar.







Lesið Sosialin so eru tit við